

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 03 - 2013

# Brúka minni úr oljugrunni í 2014

Norski fíggjarmálaráðharrin, Sigbjørn Johnsen, mælir til, at tað almenna skal brúka minni av oljupengunum næsta ár. Hann vísir á, at sambært metingum verða 66.000 fleiri í arbeiði næsta ár enn í 2012, og at tað fer at geva størri skattainntøkur og harvið grundarlag fyri at spara eitt sindur av oljukrónum, sigur hann. Fíggjarmálaráðharrin vísir á, at tá tað gongur væl í búskapinum uppi á landi, og vøksturin er góður smanborið við onnur lond, so er grundarlag fyri at brúka minni burtur av oljuinntøkunum. -Tað ger tað møguligt at spara meiri til framtíðina, sigur Sigbjørn Johnsen við norska kringvarpið. Í Framburðsflokkinum eru tey ikki samd við ráðharranum. -Framburðsflokkurin er fyri at brúka meiri av oljuríkidøminum til neyðugar dagføringar av samfelagnum, samstundis sum vit eru fyri at spara í umsitingini, sigur forkvinnan, Siv Jensen, við kringvarpið. Hon sigur, at nógv viðlíkahald liggur á láni, eitt nú við vegum og jarnbreytum, og at í roynd og veru er tað ábyrgdarleyst at spara pengar nú. -Eg skilji ikki, hví tað er skilagott at goyma eina rokning til okkara børn og abba- og ommubørn, tí hon gerst bara størri og størri. Vit kunnu loysa trupulleikarnar nú, sigur Siv Jensen.